*Skúlamálið í Kollafirði:*

# Børnini halda fram í Kollafjarðar skúla

*Foreldrabólkurin, sum herfyri meldaði 22 børn úr skúlanum, fyri at mótmæla at ein 1. lærari varð settur, hevur nú játtað at lata børnini verða verandi í skúlanum. Skúlin og Landsskúlafyrisitingin hava einki frætt um hetta*

DAGNY JOENSEN

Tað er Eyðfinnur Jacobsen, advokatur, sum hevur umboðað foreldrabólkin, í royndini at fáa viðurskiftini millum skúla og foreldur í rættlag.

Hann hevur samráðst við Skúlafyrisitingina um málið, og partarnir eru komnir til eina niðurstøðu, sum stendur at lesa her á síðuni.

Advokaturin sigur, at foreldrabólkurin hevur góðtikið loysnina.

**Vistu av ongum**

Tað hava hinir partarnir - skúlin í Kollafirði og Landsskúlafyrisitingin ikki, tí teir vistu av ongum, tá útvarpið á middegi bar hesi tíðindini.

Tá vit ringdu til skúlan í Kollafirði, fyri at fáa eina viðmerking, visti skúlin einki at siga, av tí at einki skriv var komið frá skúlamyndugleikaunum ella advokatinum hjá foreldrabólkinum.

Tað sama var galdandi á Landsskúlafyrisitingini.

Tá Hensar Ellingsgaard, stjóri, kom á skrivstovu sína eftirmiddag í gjár, lá fax'ið frá Eyðfinni Jacobsen á skrivarabordi hansara.

Heldur ikki hann visti av nøkrum. Hensar Ellingsgaard segði við Sosialin stutt fyri at blaðið fór til prentingar, at hann hevði kallað inn til fundar seinnapartin, og at hann ikki kundi gera viðmerkingar til málið, fyrr enn eftir fundin.

- Mær vitandi er málið ikki liðugt viðgjørt enn, sigur Hensar Ellingsgaard.

Ætlanin var annars at gera eina kanning, sum foreldrabólkurin í Kollafirði skipaði fyri, og sum Eyðfinnur Jacobsen skuldi gera. Tilfarið, sum eru spurnarbløð, er samlað inn, og liggur nú á skrivstovuni hjá advokatinum.

**Eingin kanning. - málið er loyst**

- Eg vænti ikki, at kanningartilfarið verður viðgjørt nærri, av tí at nú er ein loysn fingin í málinum, sigur Eyðfinnur Jacobsen.

Spurdur, hvussu tað bar til at loysa málið júst nú, sigur Eyðfinnur Jacobsen, at orsøkin er, at málið var búgvið at loysa nú, og at hetta var gjørt í samráð millum Landsskúlafyrisitingina og advokatin, sum umboðaði foreldrabólkin.

Børnini verða nú meldað inn aftur í skúlan í Kollafirði, og um partarnir syrgja fyri at yvirhalda reglurnar, so skuldi borið til, heldur advokaturin.

- Foreldrini hava fingið sín vilja, og hava nú fingið neyðuga álitið aftur á skúlan, sigur Eyðfinnur Jacobsen í stuttari viðmerking.

*Sambært skrivinum frá Eyðfinni Jacobsen, advokati fyri foreldrabólkin, hevur skúlamálið í Kollafirði fingið sína endaligu loysn. Ivamálið er, at leiðslan í skúlanum í Kollafirði ikki hevur fingið boð um tað, og heldur ikki Landsskúlafyrisitingin, sum eru partar í málinum.*

## Skúlamálið í Kollafirði

**Viðv. skúlamálinum í Kollafirði.**

Sum advokatur fyri foreldrabólkin vísi eg á samskiftið um hetta mál, seinast skrivið hjá fyrisitingini frá 23. íh. og skal við hesum siga frá, at foreldrabólkurin tekur undir við teimum stigum, sum nú verða tikin sambært áðurnevnda skriv og av hesum ávum hevur gjørt av, at melda børnini aftur í Kollafjarðar skúla eftir summarfrítíðina í ár.

Sum advokatur fyri foreldrabólkin í Kollafirði skal eg við hesum siga frá, at foreldrini í dag hava tikið avgerð um at melda børnini inn aftur í Kollafjarðar skúla eftir summarfrítíðina í ár.

Avgerðin er tikin eftir samráðingar við Landsskúlafyrisitingina, sum eru endaðar við, at stig nú verða tikin til at fáa viðurskiftini millum foreldur og skúla og skúlamyndugleikar aftur í rættlag, jbr. hjálagda avrit av skrivi frá Landsskúlafyrisitingini til undirritaða dagfest 23. juni í ár.

Hesi stig eru:

1. Skúlaleiðarin skal hava fund við foreldrabólkin beinanvegin.
2. Skúlanevndin og foreldrabólkurin skulu hava fund beint eftir, at fundurin við leiðslu skúlans hevur verið.
3. Fyri at tryggja foreldrunum neyðugu ávirkan á skúlaskema-ini verður staðfest, at tíma- og lærugreinabýtið eigur at vera samsvarandi løgtingslóg um skúlafyrisiting og tað, sum stendur á síðunum 133-137 í álitinum við heitinum »Fólkaskúlin – Almennur partur.
4. Skúlanevndin er biðin um at taka spurningin upp um umbering við lærararnar Gunnvá Dam og Marina Joensen.

**Eyðfinnur Jacobsen, adv.**

## VALUTAKURSIR


| | | 25.06.97 | Ultimo síðsta mán. |
|---|---|---|---|
| USA | Dollarar | 656,1500 | 647,7000 |
| Bretland | Pund | 1091,6400 | 1062,2400 |
| Týskland | Markur | 381,2200 | 381,1800 |
| Svøriki | Króna | 85,3100 | 83,9300 |
| Noreg | Króna | 90,6400 | 91,4200 |
| Frakland | Frankur | 113,0200 | 112,8600 |
| Belgia | Frankur | 18,4870 | 18,4760 |
| Sveits | Frankur | 456,3700 | 459,7000 |
| Holland | Gyllin | 338,6700 | 338,7900 |
| Italia | Líri | 0,3907 | 0,3842 |
| Finnland | Markur | 127,3900 | 126,5100 |
| Ísland | Króna | 9,5600 | 9,4300 |
| Eysturríki | Skillingur | 54,2140 | 54,2000 |
| Spania | Pesetas | 4,5220 | 4,5090 |
| Portugal | Escudos | 3,7850 | 3,7670 |
| Kanada | Dollari | 471,6100 | 469,1000 |
| Grikkaland | Drakmur | 2,4450 | 2,41709 |
| Japan | Yen | 5,7710 | 5,5764 |
| Írland | Pund | 996,3700 | 980,1200 |
| | XEU | 747,1200 | 742,0300 |

Kelda: FØROYA SPARIKASSI




STÓRSLIGIN CRUISE-FERÐ Í SUÐURGRØNLANDI

í kjalarvørri føroysku útróðrarmanna



Nú er møguleiki at uppliva Grønland frá sjósíðuni - gigantisk ísfjøll, gletsjarar og heitar keldur í stórslignu grønlendsku náttúruni. Á 8 daga cruise-ferðini, við fráferð tann 17. juli, 24. juli ella 31. juli, sært tú nøkur av teimum mest avsíðis umráðunum - gjøgnum Prins Chr. Sund til eystursíðuna á Suður-grønlandi. Vit vitja m.a. býirnar Qaqortoq, Nanortalik og bygdina Aappilattoq. Vit vitja staðið, har Eirikur Reyði fyrstu ferð setti fótin á grønlendska jørð, leivdir eftir norðbúgvarnar, heitar keldur og mangt annað áhugavert.

**Prísir:**

**Suita:** ..... **15.670,-**
Einkultkoyggjur, egið wc/bað

**Mini-suita:** ..... **14.840,-**
Einkultkoyggjur, egið wc/bað


**A-kamar:** ..... **13.170,-**
Einkultkoyggjur, egið wc/bað


**B-kamar:** ..... **12.340,-**
Einkultk., 2 B-kømur deila wc/bað

**C-kamar:** ..... **11.230,-**
Koyggjusengur, fel. wc/bað á gongini.

**Íroknað prísin er:**
- Flogferð úr Før. um Ísland til Narsarsuaq og aftur
- Útferð til Qassiarsuk/Brattahlíð og Igaliku
- 1/1 pensión, 3 máltíðir um dagin + kaffi/te
- Dagligar frásagnir um dagsins sigling
- Gongutúrar í býum og bygdum

*Ferðaavgjald og 1 nátt í Reykjavík á heimferðini er IKKI íroknað prísin.*



Faldari um cruiseferðinar fæst á ferðaskrivstovum kring landið og hjá:

Atlantic Airways
Tlf. 33900 · Fax 33990